# Útgávur seinastu vikurnar

## Nordisk litteratur 2006

### – Ein bókmentalig handbók




Tíðarritið Nordisk Litteratur tekur í hesi útgávuni samanum menningina innan norðurlendskar bókmentir síðani aldaskiftið.
Greitt verður frá um framstigini innan týddar bókmentir, og hvussu tvær skaldsøgur, ið komu út í 1990'unum - Frøken Smillas fornemmelse for sne og Heimur Suffíu, hava slóðað fyri einum hópi av týðingum úr norðurlendskum málið til Evropeisk mál.
Nordisk Litteratur kom út á fyrsta sinni í 1993, og var upprunaliga ætlanin í fyrsta lagi at gera vart við bókmentaheiðursløn Norðurlandaráðsins. Síðani er árbókin víðkað, bæði í vavi og vali av evnum, men tey, ið eru stillað inn til stóra norðurlendska prísin hava altíð stóran leiklut í tíðarritinum. Nordisk litteratur er 184 blaðsíður.




## Innovasjón og avlæring

Í mai mánaði í ár var stór norðurlendsk ráðstevna á Læraraskúlanum, sum varpaði ljós á nýskapandi virksemi í pedagogiskum arbeiði. Heitið á ráðstevnuni var Innovation og aflæring. Nú eru fyrilestrarnir, ið hildnir vóru á ráðstevnuni, komnir út í tveimum bókum, sum Pauli Nielsen, ið var rektari á Læraraskúlanum, hevur ritstjórnað.
Í fyrru bókini eru allir høvuðsfyrilestrarnir, og teir eru ikki bert áhugaverdir fyri lærara og pedagogar og teir myndugleikar, sum varða av tílíkum virksemi, teir hava eisini almennan áhuga.
Seinna bókin er eitt fjølbroytt savn av greinum um granskingararbeiði innan flest allar lærugreinar og innan almennan pedagogikk, sum granskarar úr øllum Norðurlondum løgdu fram á ráðstevnuni. Bøkurnar fáast í bókabúðunum.

### CJJ Yrkingasavn:

## September í bjørkum sum kanska eru bláar




Carl Jóhan Jensen hevur ongantíð verið nær á námind so góður yrkjari sum nú. Hann hevur evnað sær sín egna stíl og teimum, ið dámar nútíðarligar yrkingar, kunnu fegnast um hetta avrik.
Carl Jóhan er eisini framúr upplesari, og tí er útgávan ein fløga, sum Carl Jóhan hevur lisið allar yrkingarnar inná.
Fløgan kostar í handlunum 182 krónur og verður á marknaðinum 16. november

## *Kvørnin* er komin




Nú er aftur ein Kvørn í handlunum við hópin av forvitnisligum tilfari. Tað er Sands Bygdasavn, sum hevur søguliga tíðarritið út eina ferð um árið, og hendan er tann níggjunda í røðini.
Ólavur Clementsen skrivar um bóndagarðarnar í Trøðum á Sandi, sum upprunaliga var ein 24 marka garður, men seinni er lagdur sundur, so har í dag eru fýra eins stórir garðar. Hann skrivar eisini um herviligu havhestasjúkuna, sum herjaði í tríatiárunum.
Palli Dalsgaard skrivar um, hvussu posturin varð fluttur um veturin í kavaveðri.
Partur av dagbók verður endurgivin í hesi Kvørnini. Tað var ungur danskur hermaður, sum skrivaði hana í 1898, tá ið hann arbeiddi í syðra parti av Føroyum sum hjálparmaður við kortlegging av landinum.
Hanus A. Samuelsen hugleiðir um myrku tíðina í Húsavík, har sólin ikki sær stóra part av vetrinum.
Kvørnin er 68 blaðsíður og kostar 80 krónur.




### Svenning Tausen:

## Orð og orðað

ORÐ OG ORÐAÐ skjýtur upp, hvussu bøtt kann verða um ússaligar orðingar, sum ofta eru at síggja á prenti og ofta eru at hoyra.

Brúka vit orðið "ynskja" rætt?
Hvørji orð skúgvar "luttaka" burtur?
Hvat er galið við samansetingum við "av"?
Nær brúka vit orðið "byrja" skeivt?
Verður orðið "framleiðsla" rætt brúkt?
"Kende til" eitur tað "kenna til" á føroyskum?
Ber til at "fremja álop" á føroyskum?
Er "orsakað av" góð føroysk orðing?
Eitur tað "atsókn móti"?

Slíkir spurningar verða viðgjørdir í hesi bókini við dømum úr fjølmiðlamáli.
Bókin er 185 síður til longdar.